Helgi Abrahamsen **Nr. 19/2019**
landsstýrismaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Svar til fyrispurningur um ljóð- og luftdálking fram við føroysku havnunum, settur landsstýrismanninum í umhvørvismálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Svar
Spurningur 1
Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at leggja uppskot fyri tingið viðvíkjandi ljóð- og luftdálking?

Svar til spurning 1
Tað er ikki greitt enn, um avbjóðingarnar við ljóð- og luftdálking frá føroysku havnunum verða greiddar við at leggja málið fyri Tingið. Vit eru í eini tilgongd, sum ikki er liðug enn. Fundir hava verið við felagið Heimafrið og Kommunufelagið. Eisini hevur verið samskifti við SEV. Fundur skal vera við "havnanetverkið" havnir hjá Kommunufelagnum um avbjóðingarnar á økinum. Á fundinum við netverkið er ætlanin at fáa greiðu á, hvørji tiltøk havnirnar sjálvar kunnu seta í verk og fyri hvørji viðurskifti neyðugt er, at landsstýrismaðurin fær til vega ásetingar, sum verða at galda fyri allar havnir til tess at avmarka ljóð- og luftdálkingina frá havnunum.

Spurningur 2
Hvørjar fíggjarligar avleiðingar fær eitt slíkt uppskot fyri t.d. kommunurnar?

Svar til spurning 2
Vísandi til svar til spurning 1 er ikki gjørligt at meta um, hvørjar tær fíggjarligu avleiðingarnar fyri kommunurnar verða. Arbeitt verður millum annað við møguleikanum, at kommunurnar kunnu fáa inntøkur burtur úr landstreymi, soleiðis at íløgurnar kunnu verða vunnar innaftur.

Spurningur 3
Nær kann tað hugsast, at eitt slíkt uppskot verður klárt at leggja fyri Løgtingið?

Svar til spurning 3
Sum áður sagt, er ikki greitt enn, hvørt loysnin er at leggja eitt lógaruppskot fyri Tingið ella um hetta verður loyst við kunngerð ella boðum. Ein loysn skal finnast og vónandi gongur ikki ov long tíð til greiða er fingin á, hvussu avbjóðingarnar verða loystar

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 26. november 2019

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður